## DAGSINS MEINING

# Føroya Tele gott úrslit

Tað er at gleðast um, at úrslitið hjá Føroya Tele gjørdist gott í farna ári. Tíðirnar eru góðar, og tí skuldi tað helst sæst á úrslitinum. Tað er einki at taka seg aftur í, at Føroya Tele er ein av týdningarmestu fyritøkum í einum lítlum oyggjasamfelagi, sum Føroyum. Man kann tosa nógv um útjaðaramenning og útjaðarafulltrúar, men ein fortreyt fyri útjaðarnum er gott samskifti bæði tá tað kemur til post, flutning og ikki minst telesamskifti.

Veitingarskyldan er eitt týdingarmikið mál. Tað er lag á manni at bjóða tænastur fram í megin-økinum o.s.fr., men tað verður so ongantíð nakar, sum fær vinning av, at bjóða teletænastur til útoyggjarnar, men vit eru øll samd um, at tær eru lívsneyðugar fyri somu oyggjar. Hvør skal gjalda hetta? Tað skal sjálvsagt áleggjast televeitarum. Hví ikki siga, at teir skulu kappast við teirri treyt, at tænastan skal bjóðast út um alt landið og ikki bert í miðstaðar-økinum?

Tað kann vera gott við kapping á fjarskiftis-økinum, men so má tað vera verulig kapping, har eitt felag sleppur at brúka sínar stórdrifts-fyrimunir. Tað er løgið at hoyra, at Føroya Tele ikki sleppur at bjóða pakkaloysnir við interneti, fastneti og fartelefoni, samstundis, sum teir fáa óbeinleiðis ábreiðslur frá Fjarskiftiseftirlitinum um kostnað. Tað sær í hvussu so er út til, at borgarin betalir meira fyri teletænastur í Føroyum, enn teir annars kundu, tí at Føroya Tele ikki sleppur at bjóða sínar fyrimunir fram.

Er tað rætt at vænta akkurát somu prísirnar her sum í grannalondunum? Nú hava vit ikki so nógv skil fyri telesamskifti, men ein lítil marknaður má verða øðrvísi at fáast við enn marknaðirnir í stóru grannalondum okkara. Eisini má vera lættari at seta antennur og sendarar upp í Danmark, ið er flatt sum ein pannikaka, í mun til í Føroyum. Kanska er okkurt annað sum er bíligari í Føroyum enn aðrastaðni og tí kann uppviga meirkostnað á øðrum økjum.

Skal tað verða kapping á teløkinum, so má tað verða ordilig kapping, har Føroya Tele sleppur at bjóða sínar fyrimunir fram. Ein sterk føroysk telefyritøka er ein fortreyt fyri samskifti millum oyggjarnar og er garantur fyri framhaldandi menning á økinum – eisini í ringum tíðum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Søguliga sæð svíkir Sambandsflokkurin Suðuroynna

**Jóannes Eidesgaard**
*formaður Javnaðarfloksins*



Tað er ikki smávegis, sum valevni Sambandsfloksins í Suðuroynni nú føra seg fram við øllum tí, sum teir vilja fremja fyri oynna. Tað er næstan einki mark fyri allari ta vælvild, teir nú vilja vísa. Hóast gamalt er at siga, at betur er seint enn ongantíð, so rokni eg við, at flestu suðuroyingar heldur minnast tær mongu ferðir, har júst Sambandsflokkurin hevur svikið Suðuroynna. Lat okkum taka fýra týðandi dømi:

**1. Smyril (ex. Morten Mols):**
Øll eru vit samd um, hvønn týdning hetta valaskip hevur havt fyri Suðuroynna. Tá Smyril varð keyptur í 1975, stóð táverandi formaður Sambandsfloksins Paula Ellefsen fram og segði, at flokkurin var ímóti keypinum av Smyrli. Men har var tó ein, sum royndist Suðuroynni hollur, og tað var Jákup Mortensen, sáli, sum einsamallur sambandsmaður atkvøddi fyri keypinum. Men hann var so bert tingmaður Sambandsfloksins tað skeiðið.

**2. Teistin (ex. Mikkel Mols)**
Tá Teistin varð keyptur í 1980, endurtók søgan seg enn einaferð. Ein samdur Sambandsflokkur eisini tingmaðurin fyri Suðuroynna Flemming Mikkelsen atkvøddi ímóti keypinum.

**3. Sølan av Teistanum**
Tá Teistin varð seldur ella rættari forerdur til Italia, varð Skotlandssiglingin niðurløgd við teimum afturstigum, tað merkti fyri vinnulívið í oynni. Men harumframt mistu suðuroyingar einasta egnaða avloysaraskipið. Hetta hendi undir einum landsstýri, har Sambandsflokkurin átti leiðsluna.

**4. Oljuútgerðarhavnin í Suðuroynni**
Og seinast Sambandsflokkurin vísti sína "vælvild" mótvegis Suðuroynni, var tá 5 sambandsatkvøður vóru ímóti, at ein oljuútgerðarhavn var løgd í Suðuroynni. Flemming Mikkelsen atkvøddi fyri, men heilar fimm atkvøður úr Sambandsflokkinum vóru ímóti. Sjálvandi kunnu Guds børn batna, meira enn so, og vónandi er Sambandsflokkurin við tíðina kanska vorðin meira vinarliga sinnaður mótvegis Suðuroynni, lat okkum vóna tað. Men eg ivist nú í, um allir suðuroyingar hava gloymt stuðulin frá hesum flokki, tá ið á hevur staðið. Ein lýsing í bløðunum við heitinum "Sambandsflokkurin og Suðuroyggin" við mynd av Johan Dahl ella Finnleiv Guttesen, sum vit nú hava sæð fleiri ferðir, hon fær okkum suðuroyingar meira at hugsa um tær mongu ferðir, har hesin flokkur hevur svikið oynna. Suðuroyingar lata seg ikki tøla av slíkum. Til tess minnast teir ov væl.

# Fullveldi og ferðavinnan

**Thomas Arabo**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



At fyrigykla fólki, at ting koma av sær sjálvum, tá vit fáa fullveldi er ein vandamikil leið. Føroyska ferðavinnan er í støðugum vøkstri og skyldast hetta eitt munagott arbeiði, ið er gjørt tey seinastu 30 árini.

At føroyska ferðavinnan uppá nakran máta líður undir, at Føroyar ikki er staðfest sum fullveldi er aftur eitt dømi um, at fólk royna at uppfinna trupulleikar og lýsa heimin við sera subjektivum brillum. Tað sum verri er, er at man roynir at billa fólki inn, at tingini fara at henda av sær sjálvum, tá vit hava fingið fullveldi.

Føroyar hevur betýðiligt meira sjálvræði enn nøkur av stórstu ferðavinnumálum í heiminum sum til dømis Kanarisku Oyggjarnar og Bermuda, ið hoyra undir ávíkavíst Spanien og Stóra Bretland. Hesi øki hava ongan trupulleika at tiltrekkja ferðafólk, hóast tey ikki eru fullveldi.

**Hvør kennir Funafuti?**
At Føroyar verða heimskendar, tá vit fáa fullveldi er eisini ivasamt. Hvussu nógv fólk hava hoyrt um Tuvalu, Nauru og Vanuatu? Hesi lond eru øll fullveldi, men eg tori at garantera, at tað er fáur maður, ið kann nevna høvuðstaðin í Tuvalu, hóast hetta land gjørdist fullveldi í hesum valskeiðnum. Um vit hyggja at ferðavinnuni í teimum londum, eg her havi nevnt og samanbera við til dømis Hawaii, ið er amerikanskur statur, so dettir tesan um fullveldi og ferðavinnu so fullkomuliga á gólvið. At Føroyar verður nevnt í CNN ella BBC eina ferð, tá fullveldið verður staðfest, hevur neyvan nakran praktiskan týdning.

**Einki kemur av sær sjálvum**
Tað krevur nógv hart arbeiði at menna ferðavinnu í Føroyum, og einki kemur av sær sjálvum, óansæð um vit eru fullveldi ella ikki. Vit kunnu tað, vit vilja, men tað krevur ágrýtni og treysti. Um man framman undan uppfinnur forðingar fyri seg sjálvan og sáar mistreysti millum sínar landsmenn, so verður ringt at koma á mál við ferðavinnuni.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VALGREINAR

# Miðflokkurin, ein øðrvísi flokkur

**Elin Tausen**
*Valevni í Suðurstreymi*



Miðflokkurin hevur eina øðrvísi Valskrá.

Miðflokkurin er ein øðrvísi flokkur, sum ynskir at føra ein øðrvísi politikk, og á tann hátt skapa eitt øðrvísi samfelag.

Hvat er tað so fyri eitt samfelag vit síggja fyri okkum? Jú, eitt samfelag har trivnaðurin hjá tí einstaka borgaranum er í hæddini, har tey eldru hava virðiligar umstøður í sínum aldurdómi, bæði tey, sum hava tørv á likamligari hjálp, og tey sum klára seg sjálvi.

Vit ynskja at skapa eitt umhvørvi har familjunar trívast, og hava góðar karmar til at skapa eitt sunt og mennandi umhvørvi í sínum heimi.

Vit ynskja at skapa eitt umhvørvi, sum er virðiligt fyri okkara menningartarnaðu og avvarandi teirra.

Vit ynskja eitt samfelag, har kristna lívsáskoðanin er sjónliga á øllum økjum.

Eg kundi hildið áfram, men eg ynski at draga eitt evni fram, sum eg ynski at virka fyri og er tað, ung og rúsevnismisnýtsla. Tað er sera týdningarmikið at vit taka hetta mál í álvara. Vit skulu ikki bara døma teir, sum selja rúsevni, men vit skulu eisini hjálpa teimum, sum eru komin sær út í trupulleikar, orsakað av eini misnýtslu. Vit hava tveir viðgerðarstovnar í Føroyum, men eg haldi ikki at teir eru egnaðir, til ungar misnýtarar. Vit skulu hava ein stovn, har hesi ungu kunnu koma og fáa viðgerð, bliva ment aftur, og stuðla til at koma í gongd við eina útbúgving, soleiðis at tey kunnu venda skeiva mynstrinum tey eru komin í. Hesin stovnur skal eisini verða ein møguleiki hjá foreldrum, at venda sær til, við spurningum og biðja um ráð og hjálp. Eisini skal hann verða við til at upplýsa um vandan av rúsevnum, kanska saman við fyribyrgingarráðnum. Her eiga vit at brúka fyrrverandi rúsevnismisnýtarar, sum kenna til misnýstlu og vandarnir við henni, á samma hátt, sum ferðslutrygd brúkar fólk, sum hava verið út fyri ferðsluvanlukku, fyri at upplýsa um vandan við ov nógvari fer.

Miðflokkurin setur tey menniskjaligu virðini hægst, tí er neygugt at fáa ein sterkan Miðflokk á ting,

Hjálp tú okkum við at fáa eina ørðvísi raðfesting við skattapeningum borgarans.

Stuðla okkum við tínari atkvøðu 30. Apríl.

Gott val.
etausen@kallnet.fo

# Eldrapolitikkur tjóðveldisfloksins

**Hallbjørg Hansen**
*Valevni Tjóðveldisflokksins í Eysturoynni*



Dan R. Petersen hevur í bløðunum ført fram, at Tjóðveldisflokkurin ongan eldrapolitikk hevur, men at Javnaðarflokkurin er einasta trygd fyri hesum. Hetta sigur hann, hóast hann átti at vita, at seinastu nógvu valskeiðini hevur javnaðarumboð verið landsstýrismaður í almannamálum.

Vit vita øll, at tørvurin á røktarheimsplássum gerst alt størri - ikki bara í Føroyum - orsakað av, at betraðu liviumstøðurnar gera, at alsamt fleiri gerast eldri og eldri - og tískil koma fleiri og fleiri ellisbrek.

Tjóðveldisflokkurin hevur verið við til at hækka fólkapensiónina munandi, soleiðis at hendan í nógvum førum er á hædd við pensiónir í øðrum norðanlondum. Tjóðveldisflokkurin fer framhaldandi at arbeiða við eftirlønarspurninginum, soleiðis at allir borgarar fáa sømilig fíggjarlig kor á eldri árum. Tjóðveldisflokkurin fer haraftrat at syrgja fyri, at tað á pensiónsøkinum eins og á øllum almannaøkinum ikki skal gerast munur á giftum og ógiftum.

100 mió kr. skulu setast av til røktarheimspláss komandi 4 árini. Tað skal eisini takast hædd fyri teimum dementu. Ein forsvarligur fíggjarpolitikkur er treyt fyri at hetta kann setast í verk. Hetta gerst tí best við, at vit framvegis miðvíst arbeiða fyri, at føroyingar sjálvir fáa fulla ábyrgd av hesum landinum.

Við at velja Tjóðveldisflokkin fáa tygum eisini trygd fyri at eldrapolitikkurin verður raðfestur fremst.

# Tak yvir høvdið

**Heðin D. Poulsen**
*valevni Fólkafloksins í Suðurstreymoy*



Íbúðarviðurskiftini saman við barnaansing og eldrarøkt verða millum størstu avbjóðingarnar komandi valskeiðið. Okkum tørvar ungfólk á ting, ið vilja raðfesta hesi øki hægri enn tunnlar og vinnustudning.

Vit skulu varveita rentustuðulin óbroyttan til teirra, sum hava sett seg fyri grundstykki ella sethús.

Vit skulu skatta inntøkurnar lættari - 10 % av brutto - hjá teimum, sum leiga kømur ella íbúðir út í egnum húsum.

Vit skulu gera tað lættari hjá sjálvsognarstovnum at byggja leiguíbúðir til bæði yngri og eldri.

Vit skulu hava eina nýggja leigulóg.

# Fólkið fyrst - ov tungt at gerast sjúk í Føroyum

**Katrin Dahl Jakobsen**
*valevni og løgtingskvinna fyri Javnaðarflokkin*



Tað kemur mangan fyri, at starvsfólk innan almannaverkið kenna seg kroyst, tí tað ikki ber teimum til at veita borgaranum nøktandi tænastu. Starvsfólkini standa fyri skotum, fáa allar ákoyringarnar, og illa fáa tey vart seg. Tey kenna neyðina hjá viðskiftafólkinum, skilja teirra støðu, men mugu ofta lata fólk vita, at hjálpin verður ikki í bræði. Talan kann vera um fólk, sum hava verið fyri hóttafalli og treingja til okkurt hjálpitól ella aðra hjálp.Tungt er at missa førleika og heilsu. Tyngri er tað, skalt tí harafturat berjast fyri tínum rættindum. Í øllum sorgarleikinum hava hesi fyrst og fremst brúk fyri umsorgan, hjálp og upplýsing um síni rættindi. At skula stríðast við myndugleikar, er steinur oman á byrðu.

Álit um hjálpitólarveiting varð skrivað fyri trimum árum síðani. Her verður víst á starvsfólkatrot og tørvandi/óhóskandi reglur og vantandi samskipan. Men, hvør nytta er í at skriva álit, sum ikki hevur verið brúkt til nakað?

Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri, at menna almennar tænastur. Endamálið er at fáa í lag tænastuvinarligar skipanir og skjóta og smidliga málsviðgerð. Tá fer borgarin at kenna, at hennara áhugamál eru fremst, og starvsfólk verða spard fyri støðugar ákoyringar.

# Nýggjur umhvørvis-politikkur

**Elin Lindenskov**
*valevni Javnaðar-floksins*



Javnaðarflokurin vil føra ein nýggjan umhvørvispolitikk. Miðast skal eftir, at Føroyar skulu verða millum heimsins reinastu lond. Fyri at røkka málinum, má hugburðurin hjá hvørjum einstøkum broytast. Tí skal umhvørvisvernd inn sum náturligur partur av uppalingini. Lokalar umhvørvisætlanir skulu gerast, har hvør einstakur borgari hevur sín aktiva leiklut. Húsarhaldsburturkast skal skiljast, við endurnýtslu sum aðalmáli. Barnagarðar, skúlar, stovnar o.o. skulu eggjast til at gerast grønir stovnar. Neyvari løggeving skal tryggja, at vit veruliga náa málinum at verða millum heimsins reinastu lond. Reint umhvørvi og burðardygg menning av okkara tilfeingi, skal setast á politisku dagsskránna. Vilt tú hava ein nýggjan umhvørvispolitikk, so vel Javnaðarflokkin og seta X við lista C.
www.lindenskov.com

# Tøma landskassan ella spara upp til fullveldi ?

**Eyðgunn Samuelsen**
*Valevni Javnaðar-flokksins í Norðoyggjum*



Herrópið hjá Tjóðveldisflokkinum, nú alt ella onki politikkurin í samband við fullveldi hevur spælt fallit, er, hvussu forða vit hinum flokkunum (les: Javnaðar- og Sambandsflokkinum) at tøma landskassan!

Teir reypa sær av einum varnum fíggjarpolitikki men teir mugu telja alt 4 ára skeiðið við í roknistykki og tað merkir eisini síðstu daggarnar tingið var saman. Teir hava í 3 ár og 11 mánaðir skúgva øll mál til viks ið hava við fólksins vælferð at gera, onki røktarheimspláss, ongin loysn á pensiónsmálinum, ongin døgnrøkt til tey eldru og óhjálpnu, tí teir skuldu spara upp til fullveldi !

So gott gekk, at teir sendu 366 milliónir niður aftur til Danmarkar, men hvar bleiv varni fíggjarpolitikkurin av tá ið tjóðveldismaðurin og tingformaðurin segði : "skal tað vera gildi, so lat tað verða gildi!" ?

Hann at kvøddi enntá fyri uppskotinum um samskatting av hjúnum, ið gevur teimum ið frammanundan fáa 15 % í skattalætta ein eykalætta á 7 milliónir aftrat. Hvør skal gjalda hetta ? tú og eg.

Jú, varni fíggjarpolitikkurin endaði við, at teir vóru við at samtykkja eykajáttan fyri íalt 77 milliónir. Hetta viðførdi at yvirskotið á fíggjarlógini fór frá 120 milliónum niður á 44 milliónir!! Jú, so sanniliga kunnu teir, uttan at skammast,bjóða seg fram at forða fyri at landskassin verður tømdur !!

Vit ið skulu gjalda gildi velja Javnaðarflokkin!
Eydgunn@post.olivant.fo